## Løgreglan hartar ráðharran



Tað er ikki á hvørjum degi, at donsk løgreglufólk alment finnast at landsins løgmálaráðharra, sum er ovasti politiski myndugleiki hjá løgregluni. Í dag hevur fakfelagið hjá løgregluni stórar lýsingar í øllum teimum størstu bløðunum, og allar eru vendar ímóti Brian Mikkelsen, løgmálaráðharra. Formaðurin í fakfelagnum, Peter Ibsen, sigur við Berlingske Tidende, at støðan er ótolandi hjá limum felagsins. Hann vísir á, at løgreglan er alt ov illa mannað til uppgávurnar. Brian Mikkelsen sigur við blaðið, at tað verður betur, og at 300 løgreglufólk koma afturat í ár og næsta ár umframt skrivstovufólk.

## Ov dýrt at útflyta feskan fisk

Tey seinastu árini er eftirspurningurin eftir feskum fiski vaksin nógv í Danmark, men í Grønlandi hevur Royal Greenland staðfest, at felagið kann ikki fáa nakað burtur úr hesum vøkstrinum. Paviaaraq Heilmann, stjóri, sigur við KNR, at felagið gjørdi nakrar royndir við at senda feskan fisk við flogfari úr Grønlandi til Danmarkar, men at tað loysti seg ikki fíggjarliga. Royndirnar byrjaði á vári í 2006, men eitt ár seinni bleiv avgjørt at gevast, tí tað loysti seg ikki. Paviaaraq Heilmann sigur, at felagið hevði trupult við at fáa fatur á feskum fiski til ta ásettu tíðina, og harafturat órógvaði veðrið flutningin.

# Dimmalætting koyrir starvsfólkið niður í løn

**Starvsfólkið á Dimmalætting mugu nú 10% niður fyri at varðveita starvið. Blaðstjórin sigur, at tað er neyðugt at spara fyri at fáa blaðið at bera seg og tað hevur starvsfólkið góðtikið**

FJØLMIÐLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Dimmalætting hevur enn einaferð sett álvarslig sparitiltøk í verk. Hesuferð er tað starvsfólkið, sum má 10% niður í løn fyri at varðveita starvið*

Dimmalætting hevur enn einaferð sett tiltøk í verk fyri at spara.

Og eisini hesuferð er tað starvsfólkið, sum stendur fyri skotum.

Starvsfólki á Dimmalætting hevur nú fingið valið ímillum at fara 10% niður í løn, ella at fara úr starvi.

Árni Gregersen, blaðstjóri, váttar, at Dimmalætting hevur sett tiltøk í verk fyri at bøta um raksturin

Og hann váttar, at í hesum sambandi vil leiðslan á blaðnum hava starvsfólkið at fara 10% niður í løn.

Her er talan um starvsfólk, ið hava hægri løn enn minstulønina, sum sáttmálin ásetur.

- Vit fara í ongum førum niður um sáttmálabundnu lønina, sigur blaðstjórin

Hann sigur eisini, at starvsfólkið hevur góðtikið at fara niður í løn.

Men hann váttar samstundis, at valið tey høvdu, var at góðtaka lønarniðurskurðin, ella at siga seg úr starvi.

Blaðstjórin leggur afturat, at lønarniðurskurðurin umfatar eisini bæði blaðleiðsluna og nevndina.

Hann sigur, at nevndin er enntá farin 50% niður í løn.

Hendan avtalan um lønarniðurskurðin hjá starvsfólkinum skal endurskoðast um eitt ár.

Hann staðfestir, at skal Dimmalætting framvegis koma út í tí líki, sum hon er í nú, ber ikki til at siga fleiri fólkum upp og tí royna tey hendan leistin at koyra fólkið niður í løn.

### Minni enn 50% eftir

Tað skerst ikki burtur, at búskaparliga afturgongdin í samfelagnum hevur verið hørð við Dimmalætting.

Tá fyritøkan var í hæddini, var hon arbeiðsplássið hjá yvir 60 fólkum, men upp á eitt heilt stutt áramál, er starvsfólkatalið minkað heilt niður í 27 fólk.

Samstundis eru bæði Vikublaðið og Vinnuvitan, sum Dimmalætting eisini átti, farin á húsagang.

Árni Gregersen staðfestir, at lýsingamarknaðurin er versnaður og tí er neyðugt at laga blaðið til tær broyttu tíðirnar.

Hann ásannar, at Dimmalætting hevur havt ilt í rakstrinum í nógv ár og tey sparitiltølk, sum eru sett í verk, eru gjørd fyri at fáa talið á botnlinjuni til at skifta lit, frá reyðum til svart.

Tað hevur ikki eydnast enn.

Hann sigur, at sjálvur raksturin av Dimmalætting ber seg, men at avkastið er ikki nóg stórt til eisini at betala rentuútreiðslurnar.

Men hann leggur afturat, at samstundis, sum blaðfólkið nú er farið 10% niður í løn, eru eisini aðrar broytingar gjørdar fyri at spara útreiðslur.

Í hesum sambandi er serblaðið, Punktum, umlagt, so at tað nú ikki longur er eitt serblað, men framyvir verður ein partur av vanliga blaðnum.

Men aðrar sparingar eru eisini gjørdar, tí allar útreiðslur hava verið undir sjóneykuni fyri at vita um tað ikki ber til at lækka tær.

Og Árni Gregersen sigur, at útrokningar vísa, at tilsamans fara hesi seinastu tiltøkini at bøta so mikið um raksturin fer at bera seg samanlagt.

# Óheppið og keðiligt tekin

**- At Dimmalætting nú hevur koyrt starvsfólkið niður í løn, er óheppið fyri allan miðlaheimin og ikki serliga motiverandi, heldur Jógvan Hugo Gardar, sum er virkandi formaður í Felagnum Føroysk Miðlafólk**

FJØLMIÐLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er eitt ógvuliga óheppið tekin til allan miðlaheimin.

Tað heldur virkandi formaður í Felagnum Føroysk Miðlafólk, Jógvan Hugo Gardar, um seinasta sparitiltakið hjá Dimmalætting, har øll starvsfólk eru koyrd 10% niður í løn.

Hann heldur, at tað er ein spurningur, hvat tað er fyri tekin, Dimmalætting gevur við hesum seinasta tiltakinum, serliga tá ið hugsað verður um, at blaðið hevur áður sett sera álvarslig sparitiltøk í verk.

Hann vísir samstundis á, at tað mangan hevur verið nevnt sum ein trupulleiki, at fjølmiðlafólk við útbúgving søkja sær starv aðrastaðni enn í miðlunum, helst tí at lønir og arbeiðsumstøður ikki eru nøktandi.

- Eitt tiltak sum hetta, at koyra starvsfólkið 10% niður í løn, fer avgjørt ikki at økja um áhugan at søkja sær starv í miðlunum, sigur Jógvan Hugo Gardar, í stuttari viðmerking.

- Tað verður ikki lættari at fáa útbúgvin fólk at støðast í miðlavinnuni tá ið ein av landsins stóru miðlum gevur slík tekin frá sær.

Annars kennir virkandi formaðurin í Felagnum Føroysk Miðlafólk, onki til avtaluna ímillum starvsfólk og leiðslu á Dimmu, men so leingi, at sáttmálin annars verður hildin við teimum minstulønum, sum har eru ásettar, kann Miðlafelagið annars onki gera.